# 2015 endar í fiasko

> *Visiónert arbeiði og strategisk menning eru bara fyri eitt sunt samfeløg, sunnar stovnar og eitt sund vinnulív. Hetta merkir í myndatalu, at er sjúklingurin veikur og illa fyri, er frægast at lata hann liggja í songini og ikki noyða hann fram á gólv*

> *Gev ikki einum bulldog varrasmyrsl. Vit hava ov nógvar bulldog-skipanir í Føroyum*



*- Áðrenn vit fara undir eina visjón 2015, mugu vit fyrst fáa tey innanhýsis viðurskiftini í Føroyska samfelagnum í rættlag. Men her manglar nógv í og vit hava rætt og slætt ikki tann neyðuga grundvøllin at byggja visjón-2015 omaná. Tí er tað neyðugt at parkera visjónsætlanina í eini trý ár, sigur Reidar Nònfjall um visjón-2015 ætlanina hjá landsstýrinum*

skelkað av Pisa-kanningini. Tað eri eg ikki, tí hetta hava verið sjónligir trupulleikar í nógv ár. Hetta eru eisini trupulleikar, sum øll hava vitað um, men ábyrgdarhavararnir hava bara latið staðið til.

– Verður visión 2015 ikki rætt fyrireikað og framd í verki, kann henda lættliga seta Føroyar enn fleiri ár aftur í tíðina.

Reidar Nónfjall sigur, at í nýggjari tíð hava vit dømi um, at stórar og visjonerar politiskar ætlanir, hava steðgað arbeiðinum við framtíðini hjá Føroyum, tí politiski førleikin og evnibi at seta slíkar verkætlanir í verk vóru ikki til staðar.

Hann sigur, at í hesum sambandi hugar hann ikki minst um fullveldisætlanina hjá undanfarna landsstýri.

## Onki kom burturúr og onki kemur burturúr

Reidar Nónfjall minnir á, at herfyri vóru føroyingar í India á vitjan.

– Tá setti eg spurnartekin við endamálið og úrslitið, sum fór at koma burturúr. Eg spurdi, hví løgmaður og vinnan ikki vitjaðu OECD fyrst, og har fingu innlit í, hvørja idealstøðu Føroyar og vinnan skulu liva upp til.

Hann sigur, at enn er púra ógreitt, hvat vit skulu liva upp til í Føroyum, eitt nú tí at heimsins fremstu lond í OECD eru so ymisk búskaparliga og eru í ávísum førum eisini heilt øðrvísi samfelagsliga.

– Í skjótt eitt ár, hava vit ikki hoyrt annað enn, at vit skulu samanbera okkum við heimsins fremstu lond í OECD. Men politiski myndugleikin hevur ikki gjørt sær greitt, hvat tað veruliga inniber.

– Tað hevði verið ógvuliga náttúrligt fyrst at avstemma Føroyar við heimsins fremstu lond í OECD og síðan vitja fjarðskotin lond um eitt ella tvey ár.

– Seinastu tíðina er so Pisa-kanningin komin, har Føroyar kunnu gera samanberingar við onnur lond. Úrslitið bara staðfestir, at tað var burturvið at vitja India, áðrenn vit hava fingið skil á okkara heimliga umhvørvi.

– Onki ítøkiligt er heldur komið burturúr ferðini og onki fer at koma burturúr, sigur Reidar Nónfjall.

– Nú er at tora at vitja framkomin lond í OECD, har summi eisini eru okkara næstu grannar, og gera enn fleiri samanberingar og síggja sannleikan í eyguni.

– Skulu vit gera okkum nakrar vónir um at bjóða okkum fram sum strategiskir samstarvsfelagir ella at selja okkara framleiðslu, mugu vit gera eitt sera umfatandi og professionelt heimaarbeiði hjá tí almenna og í vinnuni.

– Tað er í roynd og veru hetta, sum, tað ræður um hesi komandi trý árini, sigur Reidar Nónfjall.

Hann staðfestir, at tað er onki galið í, at føroyska samfelagið og vinnan royna at leggja seg uppat, hvat hendir á altjóða stigi og at vit vilja samanberast við onnur framkomin lond.

– Men vit hava vitað um vánaligu støðuna í skúlunum í fleiri ár og tað er skeivt og ábyrgdarleyst at lata standa til, inntil vit hava fingið "lík á borðið" ella til ein OECD-kanning sker støðuna út í papp fyri okkum.

– Hetta er at flýggja undan ábyrgd og tað sigur seg sjálvt, at slíkur passivitetur, hevur við sær, at vit verða langt afturútsigld á flestu økjum og tann, skaði, sum er hendur, bøtist ikki aftur.

Reidar Nónfjall heldur ikki, at hetta er í andsøgn til, at hann vil hava útlendskar stovnar at gera eina støðulýsing av føroyska samfelagnum, tí skal tann strategiska menningin eydnast, mugu vit taka samanum, finna útav, hvar samfelagið stendur og hvørjir trupulleikarnir eru, so at vit kunnu loysa teir í felag.

## Ov nógvar bulldog-skipanir

Í hesum sambandi sipar Reidar Nònfjall eisini til eitt enskt orðatak, sum sigur: Don´t give a bulldog lipstick, ella á føroyskum: Gev ikki einum bulldog varrasmyrsl.

– Hetta verður sagt um tað at sminka nakað andskræmuligt, sum heldur eigur at verða grundleggjandi broytt ella nútímansgjørt.

– Vit hava ov nógvar bulldog-skipanir í Føroyum, staðfestir stjórin í Handilsskúlanum.

Men hann staðfestir eisini, at ein støðulýsing av øllum tí føroyska samfelagnum og vinnuni eigur at gerast av óheftum fakfólkum á einum útlendskum stovni, so at landsstýrið og aðrir týðandi áhugabólkar ikki hava nakra ávirkan á úrslitið.

– Síðan eigur landsstýrið og vinnan at syrgja fyri at rudda verður upp í øllum teimum trupulleikum, sum eru í samfelagnum og vinnuni

Hann sigur, at tástaðni er klárt at stinga eina politiska visión-2020 úr í kortið.

– Hvussu kunnu vit í Føroyum gera okkum galdandi í kappingini um tøkniliga nýskapan, íverkseting og framleiðslu í vitanartungum vinnum við einum tali av verkfrøðingum, sum er 0,7% av arbeiðsmegini, har talið á verkfrøðingum í Danmark er 2,5% av arbeiðsmegini og har verkfrøðingarnir í OECD-londunum í miðal eru 4% av arbeiðsmegini, spyr Reidar Nónfjall.

– Og hvussu kunnu Føroyar gerast heimsmeistarar um níggju ár við vánaligasta fólkaskúla í OECD, spyr hann eisini.

Og hann spyr víðari:

– Hvussu kunnu Føroyar gerast best í OECD uttan professionella politiska toppleiðslu og professionella leiðslu í vinnuni.

Tá ið hann tosar um politiska toppleiðslu, hugsar hann um landsstýrið.

– Hvørji krøv seta vit til landsstýrisfólk? Krevja vit, at tey skulu hava vinnuligar og leiðsluroyndir? Nei, tað gera vit ikki, tí í Føroyum kunnu fólk koma inn av gøtuni og beint í landsstýrið. So lætt er tað ikki at gerast ráðharri í londunum rundanum okkum, tí í framkomnum londum verður roynt at fáa ordiligar profilar í landsins stjørn.

– Hvussu kunnu Føroyar gerast best í OECD, sjálvt um nógv í Føroyum framvegis gongur út uppá at røkja egin áhugamál og vina- og kenningarpolitikk?

Hann staðfestir, at vina- og kenningapolitikkur blomstrar í hesum landi og í nógvum førum eru vit sum ein stór familja.

– Vit eru altso bara sløk 50.000 fólk í hesum landi, men kortini hava vit einar 230 kommunalpolitikarar, 32 løgtingslimir, umframt øll hini, sum onkusvegna fáast við politikk. Tað ger, at vit møta politikarum við fótbóltsvøllin, í svmijihøllini og í náttklubbanum og tí er óneyðugt at kjakast so leingi um, hvussu vanligur vina -og kenningapolitikkurin er í hesum landi.

– Hvussu kann føroyska samfelagið og vinnan gerast best í OECD við leiðslum og starvsfólkum, har nøkur í dagliga arbeiðnum stríðast við rúsdrekkatrupulleikum og ringari uppmøting.

– Hetta seinasta sigi eg ikki av ongum, tí hetta havi eg upplivað fleiri ferðir.

Hann vil ikki nevna dømi, men hann hevur fleiri ferðir verið úti fyri, at rúsdrekka hevur verið uppi í, tá ið føroyingar hava umboða okkara vinnulív og myndugleikar í útlendskum høpi.

– Kanska er hetta lítisvert at nevna, men at slíkt yvirhøvur kemur fyri nú á døgum, sigur eitt sindur um skeivan hugburð og manglandi professionalismu og her skal broyting koma í, skulu vit gera okkum nakrar vónir um at vinna fram á leið.

– Eg skal ikki skera øll yvir ein kamb, verri enn so, men bara tað, at slíkt ikki er óvanligt, er so skaðiligt fyri umdømið okkara uttanlands at tað er ikki til at sleppa av aftur við slíkt umdømi.

Samstundis vísir hann á, at vit hava havt hall á fíggjarlógini í trý ár á rað, og tað enntá í hampiliga góðum tíðum og tað skal so fíggjast antin við lántøku ella við innistandandi.

## Visjónir eru fyri sunn samfeløg

Reidar Nónfjall sigur, at onkur vil kanska halda fast um, at júst hetta vánaliga útgangsstøðið og skelkandi úrslitið frá Pisa-kanningini er prógv um, at vit eiga at fara undir visjón 2015.

– Men her má eg vísa til eina gamla sannroynd, sum er, at visjónert arbeiði og strategisk menning eru bara fyri eitt sunt samfeløg, sunnar stovnar, og sunnar vinnur og fyritøkur.

– Hetta merkir í myndatalu, at er sjúklingurin veikur og illa fyri, er frægast at lata hann liggja í songini, tí verður hann noyddur fram á gólv, er alt ov stórur vandi fyri, at hann doyr.

– Tað skal ein grundleggjandi grøðing til, áðrenn sjúklingurin kann fara á føtur aftur og taka eitt tak.

## Føroyar liva ikki upp til minstukrøvuni

Reidar Nónfjall sigur sostatt, at á nógvum økjum liva Føroyar í løtuni ikki upp til minstukrøvuni fyri at reka eitt væl skipað og demokratiskt samfelag og ein professionellan almennan sektor og eina pofessionella vinnu.

– Fantastum, droymarum og tosi hava við nokk av – tað sum nú krevst, er at taka nakrar prinsippiellar avgerðir og at handla. Politiskar visjónir og politiskur kreativitetur uttan handling, kann gerast enn skaðiligari fyri samfelagið og vinnuna, enn tað vit hava sæð higartil.

– Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er, at vit sjálvi skifta inkompetentar leiðslur og starvsfólk út, bæði hjá tí almenna, í politisku skipanina og í vinnuni.

– Tað verður ein harður kostur, men hann er lívsneyðugur, sigur Reidar Nònfjall.

– At fara undir at profilera, ella at "branda" Føroyar og føroyska vinnu, er eitt vandamikið spæl at fara undir, tí ið vit vita, hvussu veikar og óprofessionellar skipanir nógv byggir á.

– Tað má tí ikki henda, at farið verður út í stóru verð við einum branding av Føroyum og føroyskari vinnu, sum byggir á nakað óektað, falskt ella fupp, sigur stjórin á handilsskúlanum.

– Áðrenn nakra branding, má ruddast upp og altjóða standardir setast fyri dygd og professionalismu allastaðnis í samfelagum og vinnuni, leggur hann afturat.

> *Eitt tað fyrsta, sum má gerast, er, at skifta út inkompetentar leiðslur og starvsfólk, bæði hjá tí almenna, í politisku skipanina og í vinnuni. Tað verður ein harður kostur, men hann er lívsneyðugur*